klaksvíkar kommuna
Postboks 2
FO-710 KLAKSVÍK
FAROE ISLANDS
e-mail: klaksvik@klaksvik.fo
Telefon (+298) 410000
Telefax (+298) 410001

18/01139-11

*Kringvarp Føroya*
*Postboks 1299*
*FO-110 Tórshavn*

*Att: Uni Leitistein Hansen, journalistur*

Klaksvík, 7. november 2018

**Viðv. innlit í samskiftið og sáttmálar ml. Kk og Bústaðir ísv. leigu av handilshølunum í Biskupstorgi**

Víst verður til teldupost tín mánadagin 15. oktober 2018, har biðið verður um innlit í hesi viðurskifti:

*1) Kringvarpið søkir hervið um innlit í alt samskiftið og allar sáttmálar millum Klaksvíkar kommunu og Bústaðir í sambandi við leigu av handilshølunum í nýggja Biskupstorgi í Klaksvík.*

2) Kringvarpið søkir hervið eisini um innlit í samskifti, sáttmálar og skjøl viðv. byggingini av nýggju sjóhitaskipanini hjá Klaksvíkar kommunu.

Innlitsumbønin í pkt. 2 verður svarað í øðrum skrivi.

*Viðvíkjandi umbønini í pkt. 1 kann kommunan greiða frá niðanfyristandandi:*

**Sjálvsognarstovnurin undir Kráarbrekku fremur og fíggjar byggingina av Biskupstorgi**

Veghæddin í Biskupstorgi er partur av tí samlaðu byggingini av Biskupstorgi, sum Sjálvsognarstovnurin undir Kráarbrekku fremur og fíggjar.

Sjálvsognarstovnurin undir Kráarbrekku – ofta nevndur Kráarbrekka – er ein sjálvsognarstovnur, sum varð settur á stovn seint í nítiárunum av táverandi Húsalánsgrunninum og Klaksvíkar kommunu, við tí í hyggju at byggja eldrabústaðir og aðrar bústaðir, og framdi og fíggjaði Kráarbrekka 1. byggistig av hesi bygging undir Kráarbrekku í Klaksvík, sum fevnir um 24 eldraíbúðir og eitt sambýli við 16 bú- og umlættingarplássum. Somuleiðis er ein veghædd undir Sambýlinum á Heygnum, sum er karmur um venjingartilboð til eldri, nevnt “Ven og virka”, og Smæruna, sum er savningarstaður hjá teimum eldri.

Tað er hesin sami sjálvsognarstovnur, ið nú – sum nevnt – fremur og fíggjar byggingina av teimum 30 íbúðunum og veghæddini í Biskupstorgi.

Sostatt er tað hesin Sjálvsognarstovnurin undir Kráarbrekku, sum er høvuðssamstarvið millum Bústaðir og Klaksvíkar kommunu, ið fremur hesa verkætlan, herundir eisini veghæddina á umleið 900 fermetrar, sum er ætlað til útvent virksemi, so sum handlar og matstovur v.m.

*Viðfest hesum skrivi eru viðtøkurnar fyri Sjálvsognarstovnin undir Kráarbrekku,* har tað eisini framgongur, at Bústaðir og Klaksvíkar kommuna eiga hvør sín helming av bæði stovnsfæi og nevndini fyri Kráarbrekku. Í nevndini fyri Kráarbrekku sita: Jógvan Skorheim, nevndarformaður, Beinta Klakstein og Gunvá við Keldu, sum eru vald av Klaksvíkar býráð, og Andras Róin, nevndarnæstformaður, Marjun Weihe Thomassen og Sigmar B. Jacobsen, sum eru vald av Bústaðir.

Í stuttum kann parturin viðvíkjandi veghæddini lýsast soleiðis:

KLAKSVÍKAR KOMMUNA Postboks2 . FR-700 Klaksvík . Faroe Islands . Tlf. 410000 Fax. 410001

**Klaksvíkar kommuna leigar veghæddina frá Sjálvsognarstovninum undir Kráarbrekku**

Samlaði kostnaðurin av veghæddini, so sum hon stendur í dag, er 25 mió. kr., sum Klaksvíkar kommuna skal leiga frá Kráarbrekku við tí fyri eyga at víðarileiga til handlar og matstovur v.m.

Hesin leigusáttmáli er um at verða klárur at skriva undir, men av tí at hetta ikki enn er avgreitt, kann innlit ikki veitast í hann júst í løtuni, men hetta verður møguligt um ikki so langa tíð, tá ið hann er blivin undirskrivaður av báðum pørtum.

**Miðbýarfelagið Biskupstorg fer at avgera og umsita allar leigusáttmálar í veghæddini í Biskupstorgi**

Á býráðsfundinum tann 21. juni 2018 samtykti Klaksvíkar býráð at seta á stovn Miðbýarfelagið Biskupstorg, sum fær heimild til, vegna kommununa, at taka avgerð um leigumálini í veghæddini í Biskupstorgi, og sum fær uppgávuna, við afturvendandi tiltøkum, støðugt at skapa lív, virksemi, trivnað og hugna í hesum hjartanum av nýggja miðbýnum í Klaksvík, sum ætlandi skal verða karmur um nógv virksemi og tiløk, bæði fyri borgararnar, sum eisini skal draga onnur vitjandi til býin.

*Viðfest er reglugerðin fyri Miðbýarfelagið Biskupstorg.*

Enn eru limirnir í nevndini fyri Miðbýarfelagið ikki valdir, men hetta liggur í kortunum at verða gjørt komandi vikurnar og mánaðirnar.

Við hesum vóna vit at hava svarað nøktandi upp á umbøn tína um "innlit í alt samskiftið og allar sáttmálar millum Klaksvíkar kommunu og Bústaðir í sambandi við leigu av handilshølunum í nýggja Biskupstorgi í Klaksvík", og eru fleiri spurningar, ert tú vælkomin at kontakta okkum.

*Vinarliga*

Jógvan Skorheim

*Jógvan Skorheim*
*Borgarstjóri*